Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Advokatskrivstovan
Postboks 6
110 Tórshavn

**Tórshavn 29. august 2013**

Journal nr.: 13/00230-4
Viðgjørt: S.R

## Avgerð viðv. yvirtøkuni hjá P/f SMS av Sp/f Inn á Norðskála

### 1. Samandráttur

Kappingareftirlitið fekk tann 8. august 2013 fráboðan um, at P/f SMS hevur ætlan um at yvirtaka Sp/f Inn á Norðskála.

Talan er um yvirtøku sum skal fráboðast, tí ein fyritøka yvirtekur aðra fyritøku, sbrt. § 13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini, og tí fyritøkurnar hava ein umsetning, sum liggur omanfyri umsetningsmørkini í § 14, stk. 1 í kappingarlógini.

Sp/f Inn er partur av samtøku sum í 2011 keypti handil við Grønlandsvegin, og sum í 2012 seldi tveir Á-handlar til P/f Poul Hansen heilsølu. Báðar yvirtøkur vóru góðkendar av kappingarmyndugleikanum.

Bæði P/f SMS og Sp/f Inn selja eitt breitt úrval av gerandisvørum, undir hesum matvørur, búnýti og aðrar vørur til húsarhaldið. Kappingareftirlitið hevur skilmarkað marknaðin til at vera sølu av gerandisvørum í Føroyum. Kappingareftirlitið hevur skilmarkað veitararnar eftir sama leisti sum í máli nr. 12/00213, t.v.s. at t.d. Magn og Effo verða ikki mettir at verða í kapping við luttakandi fyritøkur.

Við yvirtøkuni økist marknaðarparturin hjá P/f SMS við góð 2% og kemur harvið upp á 32%. Á-handlarnir sita á umleið 45%, meðan FK situr á umleið 15%. Eftir yvirtøkuna minkar luturin hjá Á-handlunum til 43%.

Sostatt fellur miðsavningin á marknaðinum eftir yvirtøkuna. Tí verður yvirtøkan ikki mett, at hindra fyri virknari kapping á marknaðinum.

### 1.1.. Avgerð

Grunda á teir upplýsingar sum Kappingareftirlitið hevur, verður ikki mett, at fráboðaða yvirtøkan vil forða fyri virknari kapping, serliga við at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkt. Kappingareftirlitið hevur tí avgjørt at góðkenna yvirtøkuna, sbrt. § 15, stk. 2, 1. pkt. í kappingarlógini.

## 2. Inngangur

Kappingareftirlitið fekk tann 8. august 2013 fráboðan frá Christian F. Andreasen, advokati, um at P/f SMS hevði í umbúnað at yvirtaka Sp/f Inn, skrá. nr. 3217.

Sambært § 13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini er yvirtøkan hjá P/f SMS av Sp/f Inn fevnd av samanleggingarhugtakinum í kappingarlógini, tí talan er um, at ein fyritøka (P/f SMS) yvirtekur aðra fyritøku (Sp/f inn).

Í § 14 í kappingarlógini eru ásett umsetningsmørk fyri nær ein yvirtøka eftir § 13, stk. 1, nr. 2 skal fráboðast Kappingareftirlitinum. Skilt verður millum yvirtøkur har báðar hava virksemi í Føroyum og har bert onnur hevur virksemi í Føroyum. Í hesum føri hava báðar fyritøkur virksemi í Føroyum og ásetur § 14, stk. 1 tá, at um minst tvær luttakandi fyritøkur hava 15 mió. kr. í umsetningi í Føroyum, og samlaði umsetningurin hjá øllum luttakandi fyritøkum er omanfyri 75 mió. kr. í Føroyum, skal yvirtøkan fráboðast Kappingareftirlitinum.

Yvirtøkan skal tí sambært §16, stk. 1 fráboðast Kappingareftirlitinum 1 viku frá tí, at sáttmálin um samanlegging er gjørdur, ella almenn fráboðan er gjørd um samanleggingina, ella at onkur ávísur hevur fingið ræðið á fyritøkuni. Freistin er 1 vika frá tí, at eitt av omanfyrinevndu er farið fram, og áðrenn samanleggingin verður framd. Kappingareftirlitið kann við støði í framsenda tilfari staðfesta, at fráboðanin er komin fram rættstundis.

Kappingareftirlitið skal sambært §4, stk. 1 í reglugerð nr. 2 frá 20. juli 2012 innan 8 yrkadagar boða frá, um fráboðanin er fullfíggjað. Tann 9. august 2013 boðaði Kappingareftirlitið Christian Andreasen, adv., frá, at fráboðanin var ikki fullfíggjað. Fullfíggjað fráboðan var send Kappingareftirlitinum tann 13. august 2013.

Í § 17, stk. 1 er ásett, at Kappingareftirlitið skal innan 30 yrkadagar hava tikið avgerð um hvørt yvirtøkan kann góðkennast sambært §15, stk. 5, ella um málið skal leggjast fyri Kappingarráðið til støðutakan.

Avgerðin er tikin 29. august 2013. og er sostatt tikin innanfyri ásettu freistina í § 17, stk. 1 í kappingarlógini.

### 2.1. Luttakandi fyritøkur

Sp/f Inn rekur handil við gerandisvørum við Norðskála. Felagið er ogn hjá Sp/f Hald, sum umframt eigur Sp/f Grønlandsvegur, Sp/f Katla og Sp/f Netto.

Sp/f Hald yvirtók Sp/f Grønlandsvegur, táverandi Sp/f Johannes Andreasen, í 2011. Yvirtøkan var fráboðað Kappingareftirlitinum tann 5. januar 2011. Kappingarráðið góðkendi yvirtøkuna við teirri treyt, at kappingaráseting áljóðandi 3 ár var broytt til 2 ár.

Í 2012 seldi Sp/f Hald sín partapening í Sp/f Svøðuni, ið rekur Á-handilin við Sundsvegin, og partapeningin í Sp/f Inn Tórshavn, sum rekur Á-handilin við Landavegin. Keyparin var P/f Poul Hansen. Kappingareftirlitið fekk tann 9. oktober 2012 fráboðan um søluna og avgjørdi tann 14. november 2012 at góðkenna søluna eftir einfaldari málsviðgerð, sbrt. §15, stk. 2, 1. pkt. í kappingarlógini.

Fyritøkan, sum verður yvirtikin, er Sp/f Inn, sum rekur virksemi innan sølu av gerandisvørum við Norðskála. Sp/f Inn er limur í Á-ketuni.

P/f SMS eigur handilsbygningin SMS, sum er Føroya størsta handilsstað. Virksemið hjá P/f SMS umfatar leiguvirksemi og sølu av gerandisvørum. P/f SMS skipar sína sølu av gerandisvørum umvegis trý ymisk handilskonsept – Miklagarður, Bónus og Mylnan. Hesi eru hvør í sínum lagi málrættað til ávísar kundabólkar.

Miklagarður er stóra handilshúsið, sum hevur størsta úrvalið av vørum, bæði tá ið tað kemur til vørubólkar og úrval innan hvønn einstakan vørubólk.

Bónus eru handlar við einum miðal vøruúrvalið. Upprunaliga var Bónus konseptið at selja lágpríshandil líkt konseptinum hjá Netto, Fakta og Aldi. Við tíðini er hetta konsept broytt til at verða meira líkt t.d. Irma ella Super Brugesn í Danmark. Eitt miðal handilshús uttan stórvegis av lágprísvørum. Í dag er ongin lágpríshandil í Føroyum.

Mylnan er bakaríið við víðkaðum úrvali av gerandisvørum.

## 3. Marknaðurin

Tá ið metast skal um avleiðingarnar av eini yvirtøku, verður í fyrsta lagi hugt eftir, hvussu marknaðarstøðan er, aftaná yvirtøkan er framd. Fyrsta stig í hesi meting er at skilmarka viðkomandi marknað og síðani verður hugt at marknaðarpørtunum á viðkomandi marknaði. Skilmarkingin av viðkomandi marknaði fer fram sambært § 5 í kappingarlógini.

Á viðkomandi marknaði eru allar tær vørur og tænastur, sum brúkarin metir kunnu varasetast (substitión) við hvørja aðra orsakað av eginleikunum, prísum og nýtsluendamáli. Tá metingar verða gjørdar um viðkomandi vørumarknað, er av týdningi at greina, hví ávísar vørur eru partar av viðkomandi marknaði og hví aðrar ikki eru tað. Hetta verður gjørt við m.a. at hyggja at, í hvønn mun vørur kunnu varasetast, hvussu kappingarfyritreytirnar eru, prísirnir, krosspríselasisitetur á eftirspurninginum og onnur viðurskifti, sum kunnu hava týdning (t.d. útboðsvarseting). Viðkomandi marknaður er landafrøðiliga skilmarknaður til eitt øki, har luttakandi fyritøkurnar selja ella keypa vørur og tænastur, sum hava so mikið eins kappingarumstøður, og sum kunnu skiljast frá grannaøkjum, av tí at kappingarumstøðurnar har eru munandi øðrvísi.

### 3.1. Viðkomandi marknaður

Fráboðari hevur skilmarka viðkomandi marknað til gerandisvørur í Føroyum. Skilmarkingin má í fyrsta lagi gerast við støðu í vøruúrvalium hjá Sp/f Inn. Talan er um eitt breitt úrval av gerandisvørum innan matvørur, búnýti og aðrar vørur til húsarhaldi.

Í øðrum lagi má landafrøðilig skilmarking gerast. Tað vil siga at finna tað økið, sum hevur somikið eins kappingarumstøður og sum skiljast kann frá grannaøkjum við at kappingarumstøðurnar eru munandi øðrvísi har.

Landafrøðiliga skilmarkingin er torfør, tí her gera fleiri viðurskifti seg galdandi annað enn avstandur. T.d. kunnu fólk, sum búgva í Sunda kommunu, men arbeiða uttanfyri kommununa, ómakaleyst gera síni innkeyp á veg heim frá arbeiði. T.v.s. at kappingarneytar hjá Sp/f Inn við Norðskála kunnu kanska liggja 60 km burtur í aðrari kommunu. T.d. vil ein búsitandi í Sunda kommunu, sum arbeiðir í Fuglafirði, rættuliga ómakaleyst kunna leita sær til handil í Fuglafirði og Gøtu.

Tí vildi tað verið meira óneyvt í hesum føri, at skilmarka landafrøðiliga marknaðin minni enn Føroyar. Tó so kann ivaleyst síggjast burtur frá Suðuroynni og Sandoynni.

Eins og í okkara grannalondum er miðsavningin innan sølu av gerandisvørum stór. Á veitarar síðuni er Føroya Keypssamtøka, P/F SMS, Á-handlarnir og Samkeyp handlar. Harafturat eru aðrir sjálvstøðugir handlar, sum ikki eru partar av Á ella Samkeyp samstarvinum, men hesir eru fáir.

Føroya Keypssamtøka hevur 8 handlar um alt landið. P/f SMS hevur 5 Bónus-handlar um alt landið, meðan Miklagarður og 3 Mylnur, sum eru í Tórshavn. Tað eru 8 Á-handlar og 16 Samkeyp handlar um alt landið. Teir 8 Á-handlarnir luttaka eisini í Samkeyp. Tað er heilsølan P/f Poul Hansen, sum eigur konsepitð Á og Samkeyp saman við teimum handlum, sum luttaka í samstarvinum. Harumframt eigur P/f Poul Hansen tveir av Á-handlunum.

Í málið nr. 12/00213 var umrøtt, um Magn og EFFO vóru á sama marknaði, men her var niðurstøðan, at av tí at hesir ikki høvdu sama breiða úrval av vørum, so vóru teir ikki partar av viðkomandi marknaði.

Kappingareftirlitið heldur fast um hesa skilmarking og sær tí eisini burtur frá EFFO og Magn í samband við hesa yvirtøku.

Fráboðari hevur latið egna meting av marknarbýtinum, og Kappingareftirlitið hevur gjørt egnar tillagingar til hesar. Kappingareftirlitið er komið til, at marknaarbýtið er sum víst á myndini niðanfyri.




P/f SMS hevur 30% av marknaðinum, FK hevur 20%, handlarnir sum virka undir Á og Samkeyp konseptinum sita á 45%. Av hesum sita handlarnir hjá PH Heilsølu á 10%.

Við yvirtøkuni av Sp/f Inn økist marknaðarparturin við í mesta lagi 2%. T.v.s. frá 30% til 32%.

## 4. Meting

Metingarstøðið hjá Kappingareftirlitinum fyri nær ein yvirtøka skal góðkennast ella forbjóðast, er í §15, stk. 2 í kappingarlógini. Ásetingin sigur, at um ein yvirtøka ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal hon góðkennast. Er hinvegin talan um, at yvirtøkan fer munandi at forða fyri virknari kapping, skal hon sýtast. Tá mett verður um ein yvirtøka kann forða fyri virknari kapping, skal atlit takast til marknaðarpartin men

hesin kann ikki standa einsamallur í eini meting. Við seinastu lógarbroytingini[1] var SIEC-kanning innførd í føroysku kappingarlógina. Kanningin letur upp fyri, at sjálvt um ein ráðandi marknaðarstøða hvørki verður skapt ella styrkt, kann niðurstøðan framvegis verða, at virkna kappingin verður forðað, og tá skal yvirtøkan sýtast. Hetta kann t.d. verða støðan, tá ið ein yvirtøka førir til ein oligopol-bygnað á marknaðinum og vandi er fyri sínámillum bundinskap millum eftirverandi fyritøkur.

Í serligu viðmerkingunum til 15, stk. 2 í kappingarlógini verður víst á, at ES-vegleiðing nr. 2008/C 265/07 um metan av ikki-horisontalum samanleggingum verður at verða vegleiðandi fyri, hvussu Kappingarráðið metir um markanaðarráðandi støðu og hindran av kapping.

Sambært ES-vegleiðing nr. 2008/C 265/07 eru samanleggingar, har samlaði marknaðarparturin er í mesta lagi 25% uttan týdning fyri kappingina og kunnu tí góðkennast. Er samlaði marknaðarparturin omanfyri 25%, men niðanfyri 50%, kann yvirtøkan skapa kappingarligar trupulleikar, serliga talið av kappingarneytum, teirra styrki, og onnur viðurskifti kunnu stuðla undir at ein yvirtøka vil kunna avmarka kappingina.

Somuleiðis verður víst á, at í yvirtøkum, sum hava eitt HHI omanfyri 2000 og eitt Delta undir 150, vil ES Nevndin meta samanleggingar verða uttan týdning fyri kappingina.

Í hesi samanlegging er marknaðarluturin hjá P/f SMS 30% og eftir yvirtøkuna verður hann í mesta lagi 32%. Yvirtøkan hevur við sær, at samlaði marknaðarluturin hjá Á-handlunum v.m. fellur við 2%. HHI er 2650 áðrenn yvirtøkuna og Delta verður -12. Hetta merkir, at miðsavning minkar og sæst hetta eisini aftur á Delta.

Kappingareftirlitið sær onga orsøk til at halda, at fráboðaða yvirtøkan fer munandi at forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu. Marknaðarparturin hjá P/f SMS økist, men liggur framvegis á einum støði, sum vanliga ikki gevur grund fyri at halda, at kappingin kann blíva forða.

### 5. Niðurstøða

Grunda á teir upplýsingar sum Kappingareftirlitið hevur, verður ikki mett, at fráboðaða yvirtøkan vil forða fyri virknari kapping, serliga við at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkt. Kappingareftirlitið hevur tí avgjørt at góðkenna yvirtøkuna, sbrt. § 15, stk. 2, 1. pkt. í kappingarlógini.

Vegna
Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
fulltrúi

[1] Løgtingslóg nr. 35 frá 27. apríl 2012 um broyting í løgtingslóg um kapping.